

# Faroe Petroleum fær 90 dollarar fyri fatið av olju

**Jógvan Hugo Gardar**

22.01.2015 - 14:32

Oljan.fo

Meðan tey flestu tosa um hvussu lágur oljuprísurin er, og hvussu trupult nógv oljufeløg hava tað orsaka av lága prísinum, so hevur føroyska felagið Faroe Petroleum ansa eftir, og hevur tryggja seg móti lága oljuprísinum.

Faroe Petroleum upplýsir, sambært norsku tíðindastovuni NTB, at teirra framleiðslukostnaður er 30 dollarar fyyri fatið. Hetta er munandi lægri enn oljuprísurin er í dag, og tryggjar í sær sjálvum at Faroe Petroleum hevur vinning av olju sum, í løtuni, verður seld fyri umleið 50 dollarar fatið.

Áðrenn oljuprísurin kavaði heilt, so tryggjað Faroe Petroleum at fyritøkan fær 90 dollarar fyri fatið av olju sum verður seld heilt fram til 30. september 2015. Fyri gass hevur Faroe Petrioleum tryggja sær fimm bretsk pund fyri MMBTU av gassi, ið er eindin sum brúkt verður tá gass skal seljast. Gassprísurin er tryggjaðu heilt fram til á sumri 2016.

Faroe Petroleum roknar við at framleiða millum átta og tíggju túsund føt hvønn dag

- Vit eru væl fyrireikaði til at taka ímóti sveiggjunum í marknaðinum. Vit eiga nógv á bók, vit kunnu lána pengar og vit hava ein javnan kontantstreymur frá ymsu framleiðslunum, sigur Helge Hammer, framleiðslustjóri hjá Faroe Petroleum og stjóri fyri virkseminum hjá felagnum í Noregi